## Rentan upp

Roknað verður við, at Evropeiski Miðbankin fer at hækka sína rentu í morgin, og í Danmark verður gitt, at danski Tjóðbankin fer at gera tað sama. Roknað verður við, at rentan fer 0,25 prosentstig upp, so hon verður 4,0 prosent. Heldur hendan metingin, er rentan hjá Tjóðbankanum hækkað 1,85 prosentstig síðani desember í 2005. Danskir búskaparfrøðingar siga, at hækkingin kemur ikki húsaeigarunum til góðar, men er góð fyri búskapin.

## Missa lesarar

Ein nýggj kanning í Danmark vísir, at donsku bløðini missa altsamt fleiri lesarar. Eitt nú vísir kanningin, at Jyllands-Posturin hevði 25 prosent færri lesarar í februar í ár enn í sama mánað í 2006. Hjá Politiken vóru lesararnir 13 prosent færri, og hjá Aarhus Stiftstidende vóru teir heili 33 prosent færri. Berlingske Tidende hevði líka nógvar lesarar í februar í ár sum í februar í fjør, men lesaratalið hjá blaðnum er kortini minkað í seinastuni.



*Línubátur tekur kassar á Toftum og fer nýggjan túr. Eystnes er ein av bátunum, sum seinnu árini er komin í flotan, ein rúmligur og hollur bátur*
*Mynd: FMF*

# Unga fólkið støðast ikki

**Ein fiskimaður sleppur ikki longur enn út til lúnningina á skipinum, tá hann er burtur. Nú nøkur feløg hava trupult við at manna skipini, kunnu vit siga, at líka so stutt, sum tað er út til lúnningina, er tað stutt út til landgongdina, tá skip koma í havn**

MANNING
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Háldan Haldansen í Vestmanna eigur felagið, P/F West Trading, sum eigur línubátarnar, Thomas Nygaard og Gullberg. Umborð á fyrrnevnda og størra bátinum liggur manningartalið um 14, og á tí minna hevur talið ligið millum 7 og 9.

Tað hevur gingið lutfalsliga væl at manna Thomas Nygaard, ið Knút Høgagarð av Toftum førir, meðan tað í seinastuni hevur gingið minni væl at manna Gullberg, ið Árni Zachariassen í Klaksvík førir.

Tað eru ikki skipararnir, sum gera munin, men í fyrsta lagi bátarnir sum arbeiðspláss.

### Skip og vaktir

Eins og umborð á flestu línubátum í dag ganga teir 6 og 6 umborð á Thomasi Nygaard, men umborð á Gullbergi, sum er ein væl minni bátur, ganga teir meira at kalla 12 og 6 tímar. Tað merkir, at menninir arbeiða í einar 12 tímar og kunnu so hvíla í aðrar 6, um alt gongur, sum tað eigur.

Vanliga gera tey størru skipini heldur longri túrar enn tey smærru. Í slíkum føri kann tað vera til fyrimuns fyri teir, sum ikki tíma at verða so leingi burtur í senn, at vera umborð á teimum smærru førunum. Í aðrar mátar eru umstøðurnar umborð á teimum størru bátunum betri, og serliga er tað vaktirnar, sum menn eru glaðir fyri.

Áðrenn línuskipini í sínari tíð fingu egningarmaskinu, var nógv vøka og nógv arbeiði umborð á hesum bátum. Øll línan skuldi egnast við hond, setast og dragast, og fiskurin skuldi kryvjast, vaskast og fáast til høldar í lastini.

Teir, sum minnast tíðina við nógvari vøku, men nú ganga 6 og 6, siga, at hetta er sum dagur og nátt. Lívið umborð á línubáti er vorðið tíðarhóskandi, samstundis sum flestu bátar eru umbygdir og nútímansgjørdir, bæði á dekkinum og í apteringini – við betri kømrum, messu, uppihaldsrúmi og klædnarúmi.

Í góðu tíðunum, sum komu nøkur ár eftir kreppuna fyrst í nítíárunum, hava feløg brúkt heilt nógvan pening upp á at gera línubátarnar betri. So, hóast línuflotin er lutfalsliga gamal, er ein stórur partur av flotanum í góðum standi.

Nøkur nýggjari línuskip eru eisini komin seinastu árini, og hesi tykjast í nógvar mátar rúmligari og hollari enn tey, sum fóru úr flotanum. Við móttøkur hevur verið høvi at sæð umborð á hesi skip, og semja man vera um, at tað sum heild eru betri skip sum koma enn tey, ið fara.

### Høgur miðalaldur

Inntøkan hjá fiskimonnum umborð á línuskipunum hevur sum heild verið góð og aftrat lættanum, sum sjófólk fáa í skattinum, tjenar tú ikki somu nøgd av peningi í landi, sum tú tjenar á skipsdekki.

Kortini vísir tað seg, at tað kann vera trupult at manna skipini í góðum tíðum, tá fólk meira søkja tað, sum er at forvinna á landi – ella ungdómurin søkir tey skúlatilboð sum eru. Tað er eisini ein sannroynd, at miðalaldurin umborð á nógvum línubátum er lutfalsliga høgur.

Men siglast skal, so leingi vit hava skip og fiskavirkisvinnu sum tað berandi í samfelagnum, og tá ið tørført kann vera at manna øll skipini við føroyskum sjófólki, eru feløg nú farin at leita uttanlands eftir fólki, sum vit lesa um í hinari greinini á hesum miðsíðum.

# Pólskir fisk

**Tá línuskipið Gullberg hjá P/F West Trading í Vestmanna fer útaftur, eftir at skipið seinastu 3-4 vikurnar hevur fingið nýggjan motor, verða tveir póllendingar millum manningina. Gongst sum ætlað, verða pólsku fiskimenninir tríggir í tali um einar 14 dagar. Tað hevur gingið striltið at manna skipið síðan í fjør summar, og nú hevur so føroyskur reiðari tikið avleiðingarnar av hesum**



MANNING
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Háldan Haldansen, reiðari í Vestmanna, hevur átt línubátin Gullberg í hálvt triðja ár, og tað eru tvey ár, síðan skipið loysti aftur sum línubátur.

0– Tað gekk lutfalsliga væl at manna skipið tað fyrsta árið og helvtina av tí næsta, men eftir summarfrítíðina í fjør hevur verið trupult at fingið nóg mikið av góðum fólki. Onkur av manningini fór í skúla, og onkur keypti sær útróðrarbát.

Reiðarin vísir á, at hóast Gullberg er ein minni bátur enn eitt nú Thomas Nygaard, sum West trading eisini eigur, er inntøkumunurin umborð á bátunum ikki so stórur. Kortini er tað ein sannroynd, at tað hevur verið truplari at manna tann minna bátin. Hjá hinum størra hava at kalla eingir trupulleikar verið í so máta.

### Hava søkt

– Vit hava søkt eftir fólki, bæði hjá ALS og við lýsingum í Útvarpi, men tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fólk, sum støðast serliga væl umborð. Tað er ikki fyri at vera negativur – ella fyri at siga nakað yvir ein kamb, men vit kunnu hugsa okkum, at tað ikki er tað mest støðuga fólkið, sum gongur uttan arbeiði í tíðum sum hesum.

Háldan sigur, at hann tí hevur sæð seg noyddan at leita út um landoddarnar eftir fólki.

– Um felagið Ocean Wide, ið er góðkent til útvegan av fólki úr útlandinum, hava vit nú fingið tveir póllendingar heim til Føroya, og vit vænta, at viðurskiftini hjá tí triðja fiskimanninum eisini koma upp á pláss um stutta tíð.

Hann sigur, at hesir báðir póllendingarnir, sum komu til landið seinasta leygardag – ávikavist 28 og 32 ára gamlir – eru royndir sjómenn. Teir hava familju og tvey børn hvør heima eftir í